


www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 05 - 2012

# Nógv seismikkvirksemi vestan fyri Hetland

Avgerðin hjá bretsku stjórnini at lækka skattin á leiting og framleiðslu vestan fyri Hetland hevur fingið bæði oljufeløg og ikki minst seismikkfeløg at økja um sítt virksemi í okkara næsta grannalag. Seinasta útbjóðingarumfarið í bretskum øki lat aftur 1. mai og sum skilst er áhugin hjá oljufeløgum at leita eftir olju og gass stórur, her ikki minst vestan fyri Hetland. Hetta hevur so eisini fingið seismikkfeløg sjálvi til at fara undir at skjóta seismikk í økjum tey rokna við verða latin oljufeløgunum í tí 27. útbjóðingarumfarinum. Bretsku oljumyndugleikarnir fara í heyst at lata oljufeløgunum nýggju leitiloyvini. Oljan.fo skilur, at nógv feløg hava søkt um loyvi í økinum millum Hetland og føroyska markið. Gongdin hevur við sær, at nógv virksemi er eisini í landi í Hetlandi. Nú um dagarnar lógu hesi bæði skipini, sum arbeiða við seismikki, í havnini í Lervick. Heimildarmaður okkara í Hetlandi Poul Moar hevur tikið myndirnar.